# Bjartur Niclasen Tvøroyri 70 ár

## 16. september

Tíðin rennur sum streymur í ár, sigur yrkjarin í vøkru yrking síni um lívið, og um tað, sum ein møtir á lívsins leið.

Nógv vatn er runnið í sjógvin síðan vit sum smádreingir vóru skótar í F.L.Ø.T.T.

Vit ferðaðust víða í landi okkara, umstøðurnar vóru ikki tær, sum vit hava í dag. Tann størsta hendingin var skótalegan vesturi í Vágum í 1945, tað var eitt minni fyri lívið.

Sum sagt vit ferðaðust um alt landið, ein góð og gevandi tíð, sum menti okkum og gav okkum kunning um land okkara. Barnaárini runnu skjótt og nógvar hendingar vóru á leiðini, størri og smærri.

Vit vóru nógvir við á skótaferðini og í F.L.Ø.T.T.

Fleiri eru farnir um sýni og aðrir eru komnir til »Støvets år«. Soleiðis legst dagur av degi.

Aftaná lokna skúlagongd var bert ein leið og tað var sjógvurin, hann dró, og har hevur tú búleikast, har hevur tú útint lívsverk títt, og tú hevur sum sjómaður borið heimbygdini heiður og æru. **Um tey stroyddu vegin her við gulli, eg altíð velja vil mær Tvøroyri**. Vit vóru skótar saman, vit møttust aftur á dekkinum á trolaranum »Røðli« úr Hafnafirði.

Tá fór tú til Íslands fyri har at finna tær pening til ta útbúgving sum bleiv lívsstarv títt. Málið náddi tú, fór aftur á skúlabonk og tók styrimansprógv. At sigla fór tú við donskum skipum, teir sóu skjótt at her var ein maður, sum teir kundu hava álit á. Seinri bleiv tú skipsførari hjá »Kosan« og tað starvið sum skipsførari røkti tú í 25 ár. Tú fekk frá reiðarínum heiðursgávu fyri álitisfult fram arbeiði.



*Hesir báðir hava føðingardag – Atli 12. september og Bjartur 14. september. Teir hava báðir á hvør sínum øki umboða Tvøroyri á virðiligan hátt*

At tað eitt langt virki lív hava verið hendingar, sum standa frammalaga er eingin ivi um, hendingar sum eru tínar og tykkara.

Tann frásøgnin, sum útvarpið hevði við teg um vandasiglingina og so samrøðan um hana, um tað, sum fór fram tá skip títt var í vanda, og tú lítillátin segði soleiðis: »Tað var ein hægri makt sum helt um stýrisvøl og bjargaði okkum«.

Hetta sigur okkum at barnalæran var styrkin í vandastund.

Góði vinur, nú ert tú komin l tað markið har tú ikki hevur ábyrgd av øðrum, tak tær nú av løttum. Tú hevur prógvað tað, at ein kann vinna hægstu tindar, um viljin og áræði er drívkraftin.

Nú sakl tú njóta títt otium, og tað kanst tú gera við góðari samvitsku.

Kona tín hevur verið tær ein góður stuðul. Meðan tú hevur verið á sjónum, hevur hon røkt hús og heim og hevur verið um børnini. Tit kunnu eldast við gleði.

Grå hår er en krone når de sidder på retfærdighedens hoved.

Børn tykkara eru væl fyri og bera tykkum gleði, tvær gentur, sum hava nomið hægri útbúgving, ein drongur, sum er lækni og tveir sum fylgja í pápans fótasporum, teir bera tín arv víðari Bjartur.

Hvat kunnu tit krevja meira.

Hjartaliga tillukku ynski eg tær og eitt blítt lívskvøld.

*Tú valdi sjógvin sum lívsstarv títt*
*og ungur tú legði frá landi*
*har hevur tú virkað og víst í verki*
*við áræði og við viljanum sterki*
*kann føra ein á ovastu rók*
*tú hevur víst tað, tú tøkini tók*
*í 25 ár skipari á brúnni við ábyrgd*
*tá tú stóð í stóru vandastund*
*tú álit títt setti á Harra tín Guð*
*hann sum øllum verkinum stýrir*
*nú kvøldast sólin í vestri setir*
*heimbygdin vøkur er tað angar og grør*
*við báti tínum tú stillisliga rør*
*Vesturskinið glæmar á Tvøroyrar fjørð.*

**Sverre**

# Preeti Payal: Nýggjur handil í Vági

**Preeti Payal er navnið á nýggjum handli, ið hevur latið upp í gomlu handilshúsunum hjá Nolsøe á Marknoyri í Vági. Indiskt hondgjørt innbúgv og brúkslutir og meturvøra er at fáa og handilin er eisini einaumboð í Føroyum fyri klædnavørur av merkinum Oktober**

HANDILSLÍV
*Dagfinn Olsen*

Leygardagin kom lív í aftur gomlu handilshúsini á Marknoyri í Vági, har handilin hjá Nolsøe helt til í gomlum døgum. Í longri tíð hevur virksemi verið viðvíkjandi ístandsetan av húsunum og leygardagin lat handilin Preeti Payal upp í húsunum. Preeti Payal bjóðar viðskiftafólki indiskt innbúgv, so sum borð, stólar og skáp úr dygdargóðum sesam træi. Hetta er sera haldgott og fæst bæði í brúnum og hvítum. At fáa eru eisini brúkslutir, klæðir og meturvøra.

Handilin er sera hugnaligur, tí handilshúsini, sum eru frá 1864, eru hildin í sama stíli. Hillar og diskar við skuffum bera boð um hetta, eins og gamli pengakassin og eitt pengaskáp, ið eisini er í gomlum sniði. Og vøran, ið seld verður, hóskar eisini sera væl inn í hugnaliga umhvørvið.



*Indiskt hondgjørt innbúgv úr haldgóðum sesamtræi er at fáa í Preeti Payal og hetta fæst bæði í brúnum og hvítum. Eisini klæðir og meturvøra er at fáa, umframt brúkslutir*

### Indisku systrarnar

Tað eru tær báðar systrarnar Jutta og Sarina Augustinussen, sum standa fyri handlinum. Handilin er eisini nevndur eftir tveimum systrum, nevniliga Pretti og Payal, sum eru tvær indiskar systrar, sum búðu í Vági fyri eini 15 - 20 árum síðani, tá pápi teirra starvaðist sum lækni í Vági.

Sera nógv fólk vitjaði innar leygardagin, tá handilin lat upp, og sølan gekk væl, siga Jutta og Sarina. Tað verður Sarina, ið kemur at starvast í handlinum, meðan Jutta, sum annars er í Danmark í lestrarørindum, kemur at standa fyri innkeypi og øðrum.

### Oktober

Jutta hevur eisini fingið samband við danskan sniðgeva, designara, ið stendur fyri merkinum Oktober. Hetta eru troyggjur og onnur pløgg, og nýggi handilin í Vági er einaumboð fyri Oktober í Føroyum.

Handilin Preeti Payal liggur við høvuðsvegin, fyrst ein kemur til Vágs. Hóast nýggjar eigarar og hóast ístandsetan, so er hugnin og gamla umhvørvið varðveitt.

- Tað var ikki eingang neyðugt at mála av nýggjum, siga tær báðar Jutta og Sarina, og sipa til gomlu og haldgóðu málingina, sum fyrr varð nýtt, og sum enn í dag sær út sum nýggj, hóast nógv vatn er runnið, síðani málað varð og virksemi var í húsunum. Men nú er nýtt lív í gomlu handilshúsunum, og ber hetta boð um áræði og nýggjar tíðir, og samstundis er gamli hugnin varðveittur.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýnt hava hjálpsemi og samkenslu í døgunum eftir at elskaði maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Martin í Grund**
**Søldarfjørður**

ólavsøkuaftansmorgun andaðist.

Tøkk til grannar okkara og onnur, sum hjálptu til í døgunum meðan hann stóð undir børu.
Takk til Jákup Kass og Henning Bøgesvang fyri troystarrík orð í heimi og kirkju.
Takk til øll tykkum, sum fylgdu honum hansara seinasta túr á foldum.
Guð vælsigni tykkum øll.

**Maria,**
**Manbjørn, Ólavur, Sámal Petur og Sólborg**



# Teitur arbeiðir við fløguni

**Eftir upptøkur í ótrúligum studio í Spania er Teitur Lassen nú aftur í Los Angeles. Vónandi verða upptøkurnar til fløguna lidnar fyrst í november**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*



*Teitur Lassen tekur upp í hugtakandi umhvørvi í Spania*
*Mynd: Conny Jørgensen*

Teitur Lassen arbeiðir miðvíst við nýggjari fløgu, sum skal gevast út av plátufelagnum Universal.

Í august mánaði fór Teitur til Spania, har ein partur av upptøkunum til nýggju fløguna skuldu gerast. Í El Cortijo, sum liggur ein góðan tíma frá Malaga, eru umstøðurnar hugtakandi. Í einum húsi í vøkrum umhvørvi arbeiddu Teitur, framleiðarin Rupert Hine og tøkningurin Steven Tayler, og ætlanin er, at hesar upptøkur skulu brúkast sum grundarlag undir restina av upptøkunum, sum verða gjørdar í Los Angeles.

– Hetta er ein øðrvísi háttur at arbeiða, men tað er best, um sjálv framførslan hjá Teiti kann hoyrast aftur á fløguni, sigur Christian Ulf-Hansen, sum er umboðsmaður hjá Teiti við heimasíðuna hjá Dansk Rock Samråd (ROSA).

### Uttandura

Nógvar av upptøkunum vórðu gjørdar uttandura, har Teitur kundi sita og njóta útsýnið, meðan hann sang og spældi.

Nú er Teitur í Los Angeles, har restin av tónleikinum skal takast upp. Aðrir tónleikarar skulu í upptøkuhølini at spæla, og ætlanin er, at tónleikurin skal verða liðugur fyrst í november mánaði. Í løtuni eru Jay Bellerose, Jennifer Condos, Pino Palladion og David Mansfield komin í upptøkuhølini at spæla inn.

– Eg rokni við, at næstu tvey árini koma at ganga skjótt við promovering, konsertum, samrøðum og ferðing. Eg gleði meg at koma út at spæla, at sleppa at uppliva nógv øðrvísi støð og at spæla mín tónleik fyri fremmandum fólki, sigur Teitur við heimasíðuna hjá ROSA.

Fyrsta fløgan hjá Teitur fyri Universal verður væntandi givin út fyrst í komandi ári.

Fyrsta Orfeus konsertin í vetur:

# Maria og Einar - Messosopran og gittari





*Maria Malmsten Steinkopf og Einar Steinkopf*

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Tað fyrsta tiltakið hjá konsertfelagnum Orfeusi í vetur verður í Norðurlandahúsinum í dag, mikudagin 9. oktober klokkan 19.30, við sangarinnuni Maria Malmsten Steinkopf og gittarleikaranum Einar Steinkopf. Tilsamans seks Orfes konsertir verða hetta skeiðið.

Hetta eru fjølbroytt norsk tónlistarfólk, sum í vetur fara at starvast í Føroyum. Tey hava tikið útbúgving á Grieg-akademiinum í Bergen, har tey umframt høvuðsgreinir sínar lósu tónleikanámsfrøði. Maria og Einar hava starvað saman regluliga í 14 ár.

Maria Malmsten Steinkopf er messosopran. Seinastu árini hevur hon burturav virkað sum freelancetónleikari. Hon hevur annars royndir sum lærari og kórleiðari. M.a. hevur hon saman við savnspedagoginum Tutta Laukholm gjørt og framført fleiri søguligar leiksýningar.

Einar Steinkopf er virkin bæði sum einleikari og sum kamartónleikari. Harumframt hevur hann útsett og umskrivað nógvan tónleik fyri rødd og gittar.

Ár 2000 kom út fløgan »Maria og de to andre«, ein verkætlan í samstarvi við yrkjaran Truls Horvei.

Skráin hjá teimum í oktober fevnir um klassisk løg fyri rødd og gittara, renessansutónleik fyri sang og lutt, sologittarverk og norskan og svenskan fólkatónleik, sum Einar hevur lagt til rættis.

Maria Malmsten Steinkopf og Einar Steinkopf verða at hoyra í Norðurlandahúsinum mikukvøldið 9. oktober kl. 19.30 og sunnudagin 27. oktober klokkan 15 verða tey í Stóra Pakkhúsi í Vági.

